

# NORRÖNA GER AFTUR JÓLATÚR TIL NEWCASTLE



## Jólatúrurin til Newcastle verður frá døgunum 29. november til 2. desember

Mong nýttu høvið í fjørð at fara jólatúr til Newcastle við Smyril Line. Bæði fyri at keypa jólagávur, men eisini fyri at uppliva tann norðurenska metropolin. Tað tekur eitt stórt samdøgur – 27 tímar – at sigla annan vegin. Steðgurin í Newcastle verður heilar 28 tímar, so fólk fáa veruliga tíð at hugna sær, og uppliva stórbýin við tí margfeldu mentanini.

Siglt verður úr Føroyum, mánadagin 29. november klokkan átta á morgni. Norröna verður frammi í Newcastle klokkan umleið 11.00, týsdagin 30. november. Fráferð úr Newcastle er mikudagin klokkan 15, og Norröna kemur aftur á Havnina, hóskvøldið 2. desember klokkan umleið 18.00.

Smyril Line leggur stóran dent á, at siglitúrurin til Newcastle, og siglitúrurin heimaftur til Føroya eisini skal verða ein stór uppliving, umframt stóru upplivingina, fólk fáa í sjálvum Newcastle býi. Kokkarnir fara millum annað at borðreiða við tí fremsta og besta teir eiga, og tað fer at síggjast aftur á matarskránni at jólini standa fyri durðum. Borðreitt verður bæði við føroyskum og við enskum jólarættum. Talan verður um alt frá føroyskum spesialitetum til fylta enska kalkun. Nakrir av Føroya fremstu undirhaldarum fara eisini at undirhalda á túrinum, og nógvir góður sangur, bæði felagssangur og framførdur sangur verður á skránni. Kostnaðurin at sleppa við Norrønu til Newcastle verður einans úr 1.195 krónum pr. persón.